

## Flattskíggi og kaffi á kopi-maskinuni

Nýggjasti fjølritarin frá Konica Minolta kann eitt sindur meira enn flestu kappingarneytarnir á marknaðinum. Umframt vanligu tvungnu uppgávurnar so sum fjølritan og fax-sendingar, hevur fjølritarin hópin av nýggjum hentleikum. Eitt nú er espresso-maskina innbygd, eins og DVD-avspælari og flatskíggi eru tað, og so kann jú væl verða, at tíðin fellur nakað lættari – eisini hóast avritini er nógv at taka. Enn er tólið tó bara framleitt sum prototypa, so forvitnir stjórar mugu bíða nakað enn, áðrenn bíleggingin kann sendast avstað.

# Visjón fyri “Gransking, menning



*Flóvin Eidesgaard*
*Vanløse 6. november 2006,*

Á visjónstorgi á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn 30. oktober 2006 var framløga av visjón 2015. Her er eitt íkast til kjakið um granskingarvisjónina og -strategiina. Seinni partur av kronik í tveimum pørtum.

Í fyrra parti, sum var í Sosialinum seinasta týskvøld, viðgjørdi eg grundhugsjónina í verandi uppleggi til granskingarstrategi. Eg ávaraði ímóti at skipa alla almenna og privata gransking í ein bygnað, har stýringsamboðið verður almennur stuðul til privata vinnugransking, tí tað vil verða ein ov stirvin skipan til avbjóðingarnar í framtíðini, og fer at avlaga vinnuna heldur enn hava við sær eina marknaðarliga tillaging. Pástandurin um, at vinnan ikki hevur ráð at granska, varð afturvístur, og eftirlýst varð í staðin kanning av, hvørjar forðingar so eru fyri vinnugransking í Føroyum.

### Úrtøka av gransking

Gransking økir okkara vitan. Granskingin gevur úrtøku við at vitanin verður gagnnýtt. Týdningurin av hesum seinna verður ofta undirmettur. Ein national granskingarstrategi eigur sjálvsagt at taka bæði hesi viðurskifti við.

Í uppleggingum til granskingarstrategi stendur, at “javnvág eigur at vera millum tað, sum verður latið, í mun til hvat fæst burturúr”. Hetta ljóðar skilagott, og á visjónstorginum spurdi eg, hvussu henda úrtøka skal mátast. Svarið var so ógreitt, at hvørki eg ella nakar eg tosaði við aftaná skilti tað. Eg rokni við tað er mátið fyri úrtøku, sum er so ógreitt.

Tað er við til at gera úrtøkuna ógreiða, og tí truplult at tryggja nevndu javnvág, um fígging og úrtøka ikki hanga saman. Tí eigur at haldast fast við, at tann sum fíggjar granskingina eigur úrslitini, og so er tað ábyrgd hjá vinnuni at tryggja, at úrtøkan av vinnugransking er nóg stór, og ábyrgd hjá tí almenna at tryggja, at úrtøkan av almennari gransking er nóg stór.

Skilmarkanin millum grundgransking og beinleiðis gagnnýtta gransking er eitt sindur flótandi. Men úrtøka av gransking, sum skal gagnnýtast beinleiðis er lættari at máta, enn úrtøkan av grundgransking, tí úrtøkan av grundgransking er sera spjadd. Úrtøkan av gransking er somuleiðis lættari at máta enn úrtøkan av almennari gransking, tí hon kann mátast beinleiðis á einum marknaði.

Sum víst á í fyrra parti, so er úrtøkan av vinnugransking við almennum stuðli helst negativt, sum støðan er nú. Hetta kann skyldast sonevndu nýskapanargjónna, sum lýsir truplu gongdina frá 1. grundgransking til 2. gagnnýtta gransking, 3. menning, 4. tøkni í framleiðslu, 5. íløgur og 6. framleiðslu og sølu. Ein góð avmyndan av hesi gjógv er gjørd av íslendska granskingarráðnum, og er lýst í álitinum hjá útbúgvingarpolitikknevndini hjá Landsstýrinum í 1999 (bind 1, s. 74), og í kronikk hjá Kjartani Hoydal í Dimmalætting 30. mars 2006. Um man við politiskum tiltøkum kann gera hesa gjógv lættari at loypa um, vil úrtøkan av vinnugransking økjast, og vinnugransking vil tá økjast uttan at neyðugt er við almennum stuðli.

Tað almenna fær úrtøku antin við at at brúka vitanina frá gransking beinleiðis í almenna sektorinum ella við at spjaða hana út í samfelagið, so øll kunnu brúka hana og taka skilabetri avgerðir. Tað er hetta seinna sum ger, at úrtøkan av almennari gransking er verri at máta: gagnnýtslan er spjadd um alt samfelagið, og er at samanbera við infrastruktur, ið øll njóta gott av í einum samfelagi. Men hetta er ikki so óveruligt, sum tað ljóðar teoretiskt.

Ikki einans vinnulívið skapar búskaparvøkstur, tað ger almenni sektorurin eisini. Ferð eftir ferð er staðfest í altjóða samanberingum, at lond við vælvirkandi almennum sektori og minimalt av korrupsjón standa seg væl. Almenni sektorurin gagnar búskaparligari framgongd beinleiðis við at veita infrastruktur og góðar tænastur, sum høvdu verið truplari hjá vinnulívi og fólki at fingið fatur á á einum marknaði. Men eisini við lógum, sum tryggja stabilitet í samfelagnum og grundleggjandi rættindi og trygd hjá borgarum og vinnuvirkjum, kann almenni sektorurin við at ávirka atferð hjá fólki og vinnu, virka til frama fyri størri vøkstri. Ein effektivur almennur sektorur brúkar harumframt minni av tilfeinginum í samfelagnum til at náa síni úrslit, og fyrsta avleiðingin av øktari vitan vil ofta vera effektivisering.

### Úrtøka gjøgnum vitanarspjaðing

Ein effektiv vitanarspjaðing í samfelagnum vil eisini økja samlaðu úrtøkuna av gransking. Klassiski mátin er kombinatiónin av gransking og útbúgving á universitetum, men nógv kann gerast aftat.

Mesta vitanarspjaðing í einum samfelag hendir tá fólk skifta starv ella fara frá útbúgving í starv. Tí eigur



arbeiðsmarknaðurin at verða gjørdur so dynamiskur sum gjørligt. Ein dynamiskur arbeiðsmarknaður vil viðvirka til at spjaða vitan millum vinnur og millum fyritøkur og millum almenna og privata sektorin – til frama fyri allar partar.

Hetta er tíverri als ikki nevnt í 2015-grundarsteininum um arbeiðsmarknað, hóast hetta er eitt øki, har nógv kann gerast frá politiskari síðu. Ofta stendur dynamikkur í andsøgn við tryggleika, og her koma vit inn á løntakararættindi, so ein tilgongd at gera arbeiðsmarknaðin meira dynamiskan kann helst einans fremjast við trýpartasamráðingum, og vil helst eisini enda við at tað almenna átekur sær nakrar eyka skyldur. (Hetta er kjakið um flexicurity, sum er aktuelt Europa, og har Poul Nyrup Rasmussen er talsmaður fyri at brúka danska modellið til alt ES.)

Tað eru serliga fólk við høgum útbúgvingum, sum skulu eggjast til at skifta starv ofta. Men hjá teimum eru krøvini til tryggleika helst ikki í so stórari andsøgn við dynamikk, sum hjá fólki við lægri ella ongari útbúgving.

Í Føroyum eru nógvar smáar fyritøkur og fyritøkur, sum als ikki hava fólk við høgum útbúgvingum í starvi, og er tí lítið og einki samskifti millum hesar mongu fyritøkur og nógva vitan, sum tær kundu havt gagn av. Tað er í smáu fyritøkunum størst tal av arbeiðsplássum verður skapt. Tí er tað ein serligur trupulleiki, at smáu fyritøkurnar sngøt sagt ikki kenna til kvalifikatiónirnar hjá fólki við hægri útbúgvingum. Her er ein serliga breið gjógv, man kann siga at marknaðurin virkar ikki, tí vitanin er ov lítil, og her kann helst vera gangligt við einum almennum stuðli í avmarkað tíðarskeið, tá slíkar fyritøkur seta t.d. akademikarar í starv. Slíkar skipanir hava verið royndar við sera góðum úrslitum í ymsum londum.

### Hvussu nógv skal granskast?

Sambært granskingarstrategiini, sum arbeiðsbólkurin legði fram, so skal granskast fyri 3% av BTÚ í Føroyum, og tað almenna skal fíggja upp til 2% av hesum, og vinnan í minsta lagi 1%. Eg spurdi á visjónstorginum, hvaðani 3% koma frá. Her avdúkaði svarið, “tað er ein tummilfingurregul, og tilmæli frá OECD” at man hevði ikki hugsað seg so øgiliga væl um.

Hóast OECD grundar sítt tilmæli á onkrar kanningar, so er talið 3% ikki svarið uppá, hvussu mest fæst burturúr gransking. Og bara at fylgja tilmælinum kann gera, at man gloymir at kanna, um gransking gevur fulla úrtøku.

Nógv skilabetri hevði verið, um man frá almennari síðu tekur av forðingar fyri at vinnan fær úrtøku úr síni gransking, og so letur vinnuna finna út av, hvussu nógv hon skal granska.

Nógv týdningarmiklari enn, hvussu nógv tað almenna granskar, er at tryggja, at úrtøkan er mest møguligav almennu granskingini. Játtanir til gransking skulu altíð kappast við onnur